## Kjarnorka í póløkinum

Norska tíðarritið Teknisk Ukeblad veit at siga, at russar eru í ferð við at byggja eitt flótandi kjarnorkuverk, sum teir ætla at brúka í økinum við Norðpólin. Ætlanin hjá russum er, at verkið skal lata tí komandi olju- og gassútbúnaðinum í Barentshavinum orku. Tíðindini fella ikki í góða jørð hjá Miljøvernforbundet í Noregi. Formaðurin, Kurt Oddekalv, sigur við Teknisk Ukeblad, at russiska ætlanin er flótandi ørskapur, sum hann málber seg.



## Illir tinglimir

Tingfólk úr øllum flokkum í íslendska Altinginum vóru hvassorðaðir, tá tingið mánadagin viðgjørdi eitt uppskot um at fordøma framferðina hjá amerikanarum í Guantanamo-fangaleguni. Tingfólk vístu á, at CIA sambært álítandi keldum hevur beint fyri myndum, sum prógvaðu, at tænastan var farin illa við fangum, og tey hildu, at slíkt eigur Ísland at fordøma. Íslendingar krevja, at mannarættindini verða hildin, søgdu tingfólkini.

# Gott at hava góðar egnarar

**- Tað er altíð stuttligt at egna, tá bátarnir koma aftur fullfermdir við fiski, sigur 76 ára gamli Karit Hansen av Viðareiði. Fyrrapartin í gjár hittu vit hann í einum egningarskúri í Hvannasundi**

EGNARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

**Hvannasund:** Tað er ikki nógv lív at hóma her á havnarlagnum um middagsleitið ígjár. Og hví skuldi tað eisini tað?!

Klokkan er farin av hálvgum eitt, og flestu fólk munnu sita heima við døgurðaborðini og eta.

Ein maður rokast umborð á strandfaraskipinum Másanum, men annars er eingin sál at hóma. Her átti at verið nógv lív, tí nógvir bátar liggja her og streymurin í batningi.

Í einum vindeyga sæst kortini ein maður standa og egna. So skjótt hann sær bilin hjá Sosialinum, Snoddi, tekur hann til beins og hvørvur í bili sínum.

Men í einum øðrum egningarskúri stendur Karit so trúfastur og egnir. Hann er so ikki farin norður til heimbygdina at eta.

- Nei, eg tók ein matpakka við mær í dag, og so klári eg nakrar tímar aftrat, sigur hann, meðan hann so trúfast egnir góðu gágguna á línuna.

Hesa løtuna er hann kortini einsamallur í skúri. Men um eina løtu munnu hinir báðir starvsfelagar hansara fara at koma.

Allir egna teir hjá útróðrarbátinum "Olevina" sum er heimahoyrandi á Viðareiði. Sama morgun vóru teir afturkomnir við 5000 pundum.

Av sonnum ein góður dagur hjá útróðrarmonnum – og egnarum!

### Gággan er best

Í hesum døgum er streymurin í batningi. Hann var uppá tað harðasta um vikuskiftið, men er nú minkandi og verður av tí besta um vikuskiftið.

Mikunáttina var av besta veðri, og tá fóru teir á Olevinu til útróðrar við íalt 34 stampum. Í gjáramorgunin komu teir at landi aftur við góðum fongi.

Olevina liggur við bryggju her í Hvannasundi, so stuttur vegur er at fáa stamparnar umborð aftur, tá farast skal á næsta túrin.

- Teir søgdu frá góðum fiskiskapi í nátt. Serliga gott var tað, at eini 4000 pund av veiðuni vóru toskur, greiðir royndi egnarin frá.

Í løtuni egna teir mest við

> *Tað besta við tí er, tá teir fara til útrógvar við línu og koma aftur við nógvum fiski. Tá sær ein greitt, at her er talan um dugnaligar egnarar*




*Olevina kom aftur av útróðri mikumorgunin við 5000 pundum*